LM-099/2023

Fylgiskjal 12

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið

Dagfesting: 12.02.2024
J.nr. 24/00056-7
Skrivað hevur: Jóanis Erik Køtlum

Viðmerkingar til "Uppskot til løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu (Ferðavinnulógin)

Hóast tað kann undra, eins og greitt frá í viðmerkingunum til løgtinglóg um burðadygga ferðavinnur (hereftir Ferðavinnulógin) at eingin yvirskipa lóggáva er um ferðavinnu í Føroyum, fegnast Fuglafjarðar kommuna yvriskipa um, at eitt so nógv umrøtt mál sum málið um gongd í haga endiliga er komið til viðmerkingar og møguliga víðari politiska viðgerð.

Tað jaliga við uppskotinum er, at málið endiliga er sett á dagsskrá til ítøkiligt kjak um ymiskar táttir viðvíkjandi ferðavinnu.

Tað yvirskipaða neiliga við uppskotinum er, at uppskotið í stóran mun leggur seg út í kommunal viðurskifti, ger seg inn á kommunala sjálvræði, eins og tað í støðum tykist ógreitt og umsitingarliga tungt samstundis sum uppskotið leggur eina rað av uppgávum út til einstøku kommununrnar.

Kommurnnar eru ymiskar í støddd og flestu hava avmarka arbeiðstilfeingið. Nógv av mest vitjaðu støðum í Føroyum eru júst í smærri kommunum við fægst tilfeingið at loysa uppgávurnar.

Um samanborið verður við eitt nú Danmark og hugt at donsku lóggávuni á økinum (Bekendtgørelse af lov om dansk turisme), er inniverandi uppskot ógvuliga lítið yvirskipa, og leggur seg út í kommunal viðurskifti eins og uppskotið ger seg inn á onnur lógarøkið innan uppkrevjing av avgjøldum.

Niðanfyri eru viðmerkingar til einstøku greinarnar:

§1
Teksturin sigur, at ferðavinnan skal *í øllum* lutum skipast á burðadyggum grundarlagi. Fuglafjarðar kommuna hevur torført við at fyrihalda seg til hvussu hetta skal handhevjast. Tað er ein andsøgn í sær sjálvum, tá tosað verður um burðardygga ferðavinnu, sum skal verja náttúruna, tí ferðavinnan er partur av flutningsvinnuni, sum er ein dálkandi vinna. Harafturat er tað eisini ein andsøgn tá tosað verður um at verja siðvenju, tá stórur partur uppskotinum gongur út uppá at gera upp við ella broyta verandi siðvenju. Her áttu orðingar sum "í mest møguligan mun" ella líknandi verði nýttar.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

§2
Tá allýst verður, hevði verið hóskandi eisini at lýst hvat eitt ferðafólk er. Eitt nú um føroyingar búsitandi í Føroyum eru ferðafólk, ella um føroyingar búsitandi í Danmark eru ferðafólk.

§3
Ein avleiðing av hesi greinini er, at kommunur saman við eigarum og brúkarum skal gera avmarkingar og reglur fyri hvussu ferðast skal uttangarðs og fram við strondini. Hetta er stór uppgáva at leggja á kommunurnar. Í Fuglafjarðar kommunu vísir tað seg ógvuliga trupult hjá høgunum at liva upp til viðtøkuføri tá tað viðvíkur at fáa ein meiriluta av eigarum at møta á fundi hóast meiriluti av markatali er møtt.

§4
Í hesi greinini verða orð, sum skaða, órímiligan ampa, ampa og fyrilitarloysi. Hetta eru orðingar, sum í stóran mun leggja upp til tulking og verða tí truplar at handhevja. Spurningurin er somuleiðis, hvør skal hava eftirlit við at handhevja atburð hjá teim ið frítt ferðast og uppihalda seg uttandura. Verður hetta ein kommunal uppgáva?

§5
Hendan greinin snýr seg ikki beinleiðis um kommunir, men óbeinleiðis tí kommunur skulu hava ætlanir fyri økini. Tí er lætt at ímynda sær, at kommunur kunnu koma at enda sum millummaður. Harnæst gevur teksturin landsstýrismanninum stórt vald til sjálvan at gera avtalur og tá nýta sín útøvandi rætt á privatari ogn.

§6-§9
Yvirskipa sæð, áseta hesar greinar, at kommunurnar(harundir nevndir) skulu gera eina ferðavinnuætlan, farleiðir og skilhaldsreglur í samráð við brúkara ella eigara, sum skal vera góðkend innan 1. Juni 2025. Her síggja vit ein trupulleika um nú eigarar og brúkarar ikki eru sinnaðir ella hava orku til, at gera eina ferðavinnuætlan. Vit síggja ikki nakra lóggávu, sum áleggur eigarum og brúkarum, at skula gera ferðavinnuætlan í samráð við kommununa. Kommunan kann tí verða noydd at gera seg inn á ognarættin um hon skal liva upp til §6 stk. 3.
Hesar greinar leggja eisini arbeiðstrýst á kommunurnar. Harvið leggur teksturin seg inn á kommunala ræðisrættin, har hvørt einstakt bý- og bygdarráð raðfestur hvar sín fíggjarliga orka skal nýtast. Fíggjarárið 2024 er nýliga byrja við nýggjum fíggjar- og íløguætlanum og hevur neyvan nøkur kommuna ikki-raðfestan pening tøkan, sum kann flytast til nýggj virkisøkir.
Eitt nú verður ásett í §8 stk 1. at kommunan skal merkja og gera farleiðir..Hetta krevur fíggjarliga orku og umraðfestingar og leggur seg harvið út í kommunala sjálvstýrið.

§10-§12
Onga viðmerking.

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í stað 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

§13
Tá eitt alment avgjald afturat skal krevjast av ferðafólki, hevði tað sum nevnt í byrjanini í hesum skrivið, verið gagnligt við einari allýsing av hugtakinum "ferðafólk". Eru eitt nú tey sum koma til landi í arbeiðsørindum at meta sum ferðafólk?
Somuleiðis ásetur stk. 3, at gjaldið skal krevjast upp saman við ferðagjaldinum. Sambært §1 í løgtingslóg nr. 37 frá 26. mai 1988 um ferðagjald, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 6. mai 2013 verður gjørt greitt, at verandi ferðagjald verður uppkravt av fólkið, ið fara av landinum. Hetta tykist vera ein andsøgn, tí verandi ferðagjald verður uppkravt av fólkið ið fara av landinum, meðan nýggja gjaldið skal krevjast av fólkið ið koma til landið. Tí kann tað ikki krevjast upp saman.

§14
Tað er lítið sannlíkt at nattúrugjaldið dekkar tær útreiðslur kommunurnar koma, at hava av øktari umsiting og uppgávum í sambandi við lóggávuna. Harafturat verða kommunurnar álagdar uppgávur og harvið nýta tilfeingi við til dømis at gera gøtur uttangarðs, sum ikki koma øllum borgarum í kommuni til góðar.

Samanumtikið tekur borgarstjórin í Fuglafiðri ikki undir við uppskotinum í verandi líki og mælir til at gera størri broytingar soleiðis at lógin verður einfaldari at verkseta og viðlíkahalda.

At ferðast í náttúruni er gott fyri bæði heilsu og trivnað. Eg vil mæla til at tillaga verandi lóggávu so fólk Føroyingar hava frítt at fara, í náttúruni, so leingi tað ikki er vinnuligt og so leingi tað er í tráð við virksemi hjá eigarum og brúkarum av høgunum. Harafturat mæli eg til, at arbeiða við eini breiðari semju bæði í politisku skipanini og hjá teimum sum vara av jørðini, um hvussu reguleringar skulu vera fyri vinnuferðavinnu og útlendingar.

Skulu kommunurnar hava ein leiklut skal loysn fyri eyka fíggjarorku til tað arbeiði kommunurnar koma, at arbeiðnum við lóggávuni.

Um tað veruliga er ynskið at fáa eyka inntøku til landið at nýta til lendisarbeiðir í kommunum, hevði verið lættast og mest rímiligt at at lagt eitt gjald á gistingar á gistingarhúsum, tí gistingarhús hava eitt peningaligt forhold við ferðafólkið.

3

Vinaliga

Dávur Juul, borgarstjóri

Dávur Juul
Borgarstjóri
Í Stød 5
530 Fuglafjørður